# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

Tummas Jacob Jensen úr Skálavík, vanliga nevndur Tom, andaðist í heiminum sunnudagin, 83 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Skálavíkar kirkju hósdagin klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini.

**Sólveig Reinert Samuelsen** andaðist leygardagin 81 ára gomul. Kistan kemur í Ebenezer týskvøldið kl 18.00. Jarðarferðin verður úr Ebenezer mikudagin KL. 13.00. Tey í vilja minnast Sólveig, kunnu lata Akurinum eina peningagávu. Konto í peningastovni.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og bróður okkara

**Tórálvur Sigurd Stenberg**
* 28. august 1932 í Sandvík
† 11. januar 2008 í Ballerup

hevur eftir stutta sjúkralegu fingið frið.
Jarðarferðin verður úr Holmens Kirke leygardagin 19. jan. 2008 kl. 11.00.

*Vegna familjurnar*
**Rigmor v/familju**

Tey, ið vilja minnast Tórálv, kunnu í staðin fyri blómur, lata eina peningagávu til "Týsdagsklubban" í Føroyahúsinum.
Konta nr. 0307 8971-847-817 í Nordea bank



## Uni Vestureið deyður

Mánadagin 14. januar andaðist Uni Vestureið politiinspektørur í Havn á Ríkishospitalinum, 58 ára gamal.

Uni Vestureið var føddur 12. mars 1949 í Vági. Sum 21 ára gamal byrjaði hann sum politistanæmingur í 1970.

Eftir lokna útbúgving varð hann settur á starv sum politistur í Havn í 1972. Í 1983 varð hann settur sum vaktleiðari á politistøðini í Havn. Hann var varaleiðari á kanningardeildini frá 1980 til 1988, og í 1989 varð hann settur sum leiðari á kanningardeildini. Seinastu 10 árini hevur hann verið politiinspektørur fyri Føroyar.

Í sínum starvi var Uni í nógvum ymiskum nevndum, m.a. umboðaði hann politiið í Landsferðslunevndini, har hann samstarvaði við t.d. Landsverk, Akstovuna og Ferðslutrygd. Hetta var eitt arbeiði sum hann legði nógva orku í, og sum hann gekk høgt upp í. Hann var fastur limur í loyvisnevndini, sum viðger skeinkiloyvir, har hann umboðaði Føroya Landfúta.

Eyðkenni fyri Una var, at hann var fakliga dugnaligur og sera arbeiðssamur.

Í síni frítíð spældi hann nógv flogbólt og so seint sum á vári 2007, var hann við vinmonnunum í Íslandi ein langt vikuskifti til hugna og flogbólt.

Uni var giftur Cesiliu, f. Eliasen, úr Klaksvík. Tey eiga børnini Rannvá og Magnus og ommu- og abbadóttrina Sissal.

mg

Tíðargreinin

## … Nógv egg í fleiri kurvar

skarðslop á uppskotinum til Fíggjarlóg fyri 2008. Gaman í vóru nakrar hækkingar í uppskoti, men einki at tosa um í mun til visjónirnar. Í hesum døgum er tað vinnan, sum gongur á odda at vísa á tørvin og eftirlýsir einum sterkum og umfatandi universiteti í Føroyum. Hetta hava Fróðskaparsetrið – universitetið – og granskingarstovnarnir eisini víst á í fleiri ár, uttan tó at tað er eydnast serliga væl at sannføra politisku skipanina um, at stórar íløgur, eg meini nógvur peningur, er fyrsta og størsta fyritreytin fyri at menna føroyska universitetið og harvið samfelagið.

### Íløgur í framtíðina

Um lurtað verður eftir politisku agitatiónini nú, so er breið semja um, at játtan til granskingar er ein íløga, ikki ein útreiðsla. Eins og við øðrum íløgum, t.d. í partabrøv, er tíðarhorisonturin rímiliga langur, áðrenn íløgan er afturvunnin og eitt avkast í skapi av ítøkiligum granskingarúrslitum hómast. Mett verður, at tað ganga í minsta lagi 8 ár -, frá tí at fólk fara undir hægri útbúgving og til tey hava lokið Ph.D. prógv - áðrenn talan er um ein fullfloygdan granskara, sum er klárur at fara undir at arbeiða miðvíst og harvið levera granskingarúrslit.

Tað hevur stóran týdning at gera sær greitt, at tað er ein vági í at gera íløgur í gransking, eins og tað er á øllum øðrum íløguøkjum. Tað er eingin trygd fyri avkasti av íløgunum, men við góðum skipanum er møguleiki fyri góðum úrslitum. Eins og í vinnuni er neyðugt at gera strategiskar íløgur, velja sær nøkur serliga áhugaverd øki, gera neyvar forkanningar og so ikki minst ansa eftir at spjaða váðan, og ikki leggja øll eggini í somu kurv.

### Hevur skund

Skulu vit gera okkum nakra vón um at kunna fylgja við altjóða samfelagnum, tá tað snýr seg um kappingarføri, sunna vinnu, og góðar liviumstøður fyri øll fólk í Føroyum, má tað satsast stórt nú. Stórar íløgur skulu sum skjótast gerast bæði í universitetið, verandi granskingarstovnar og í granskingargrunnin. Satsast skal eisini innan nýggj øki, og her er ætlaða granskingarparkin eitt upplagt stað at byrja. Týdningarmest er at satsa á fleiri økjum samstundis, so sunn kapping kemur í.

Føroyska granskingarumhvørvið treingir til nógv størri dynamikk, kapping og útskifting. Sum er, er umhvørvið so lítið, at talan ikki er um eina natúrliga útskifting og tilgongd av nýggjum fólki og kreftum. Leikluturin hjá Granskingarráðnum er her at vera við at menna nýggjar granskarar og/ella menna gransking innan nýggj ella serliga áhugaverd økir í Føroyum. Granskingarstovnarnir eiga í nógv størri mun enn nú at kunna seta nýggjar granskarar við sjálvir og at rekrutera burturúr teimum, sum Granskingarráðið og útlendsk granskingarumhvørvi hava verið við at ment. Hinvegin skulu fleiri av teimum granskarum, sum Granskingarráðið letur stuðul til, halda fram við sínum virksemi í vinnuni og í útlendskum granskingarumhvørvum. Soleiðis tryggja vit okkum áhaldandi at kunna endurnýggja og menna granskingarumhvørvið

### Tann, ið váðar, vinnur

Hvør fær so ágóðan av íløgunum? Bæði vinnan og samfelagið fáa beinleiðis og óbeinleiðis ágóðan av íløgunum í gransking. Beinleiðis vinningur fæst av granskingarúrslitum, sum geva fleiri inntøkur/spara pening. Hinvegin fæst óbeinleiðis vinningur av granskingarúrslitum, ið geva okkum boð uppá, hvussu vit kunnu skipa samfelagið, heilsuverkið, undirvísingarverkið, umhvørvisverkið o.s.fr. Harafturat er tað gagnligt við betri skikkaðari arbeiðsmegi, áhugaverdari og dynamiskari arbeiðsmarknaði. Fyrimunirnir eru nógvir – um vit tora at gera íløgurnar.